

*Julian Assange stovnaði Wikileaks í 2006. USA vil fegið koma á tal við hann, men sum ein annar journalistiskur James Bond krógvar hann seg í London*

ovurstór lán í Kaupthing í Íslandi, áðrenn bankin fór á húsagang, hvørji eru limir í fremmandafíggindaliga flokkinum British National Party, og hvat varð umrøtt á innanhýsis fundum í sambandi við veðurlagstoppfundin í Keypmannahavn. Ongin verður spardur, tá Wikileaks fer til verka, og ongin verður álopin partapolitiskt. Málið er aleina at fáa sannleikan á borðið.

## Minnir um leka í 1971

Julian Assange verður nógvastaðni fataður sum ein fíggindi mótvegis trygdini hjá bæði londum og einstaklingum. Í sambandi við upplýsingarnar, ið lóku út um kríggið í Afganistan, vórðu nøvn á sivilum afganarum, ið samstarvaðu við hersetingarvaldið, eisini kunngjørd. Wikileaks varð tá lagt undir at seta lívini hjá hesum fólkum í vanda, eins og felagsskapurin við sínum virksemi støðugt verður lagdur undir at vera ein hóttan ímóti amerikonskum hermonnum. Summar av hesum atfinningum hevur Wikileaks tikið til sín og kunnger nú færri nøvn.

Wikileaks virkar fyri, at fólk, ið avdúka loynidómar um órættvísa, ósanna ella korrupta atferð, ikki skulu verða sett føst fyri at bera fram sínar upplýsingar. Hetta hendi, tá kiniesiski journalisturin, Shi Tao, varð dømdur inn at sita í 10 ár í 2005, tí hann hevði almannakunngjørt ein teldupost hjá kinesiskum myndugleikum um ársdagin fyri hópdrápið á Himmalfriðartorginum. Meðan kinesiska stjórnin á hendan hátt trælkaði talufrælsið, treiskast Wikileaks og almannakunnger mangt slíkt úr øllum heiminum.

Hugmyndin handan virksemið hjá Wikileaks er samanborin við átakið hjá amerikanaranum, Daniel Ellsberg, sum í 1971 lak 7.000 skjøl úr Pentagon um kríggið í Vietnam. Hóast amerikanska stjórnin heldur, at Wikileaks skaðar áhugamálini hjá USA, so hevur Ellsberg vart felagsskapin og var eisini við á tíðindafundinum hjá Wikileaks í London í oktober í ár, tá skjøl um Irak-kríggið vórðu avdúkað.

> **Wikileaks virkar fyri, at fólk, ið avdúka loynidómar um órættvísa, ósanna ella korrupta atferð, ikki skulu verða sett føst fyri at bera fram sínar upplýsingar**

Tíðindafundurin varð vístur beinleiðis í nógvum sjónvarpsstøðum og eisini á internetinum. Julian Assange greiddi á fundinum frá seinastu avdúkingunum og svaraði spurningum.

Wikileaks er sum gøluskapari eisini samanborið við Watergate-gøluna í 70'unum, tá Richard Nixon visti, at hansara menn brutu inn í høvuðssætið hjá demokratiska flokkinum í Watergatebygninginum. Gølan kostaði at enda Nixon forsetasessin, men tað, sum Wikileaks ger, kann als ikki javnmetast við hetta heldur klossuta innbrotið, tí mongdin av upplýsingum, ið Wikileaks avdúkar, er nógvar ferðir størri enn tá, tær snúgva seg um viðurskifti kring allan heimin, og haraftrat verður alt tað politiska, umsitingarliga og hernaðarliga valdið í USA álopið.

## Internetið sum hóttan

Tey 1.200 fólkini, sum sjálvboðin hjálpa Julian Assange at avdúka loyniligar upplýsingar, eru øll fólk, sum eru ónøgd við tey tíðindi, sum siðbundnu fjølmiðlarnir bera heimsins almenningi. Fjølmiðlarnir tora ofta ikki ella eru ikki førir fyri at tala máttmiklum stjórnum ímóti, og avmarkað er tí, hvat teir avdúka. Eisini eru flestu teirra heftir at fíggjarligum áhugamálum og kunnu tí skjótt verða revsaðir fíggjarliga, um teir ganga máttmiklum eigarum ella lýsarum ov nær. Wikileaks hevur ongi tílík atlit at taka, tí felagsskapurin er óheftur fíggjarliga.

Í eini amerikanskari sjónvarpssamrøðu við Julian Assange nevndi spyrjarin, at Wikileaks hevur í fýra ár megnað at almannakunngjørt fleiri loynilig skjøl kring heimin, enn allir heimsins fjølmiðlar nakrantíð hava megnað at almannakunngjørt. Assange varð spurdur, um hetta er so, og hann noktaði ikki fyri tí. Tvørturímóti segði hann, at hetta vísir bara, hvussu lítið siðbundnu fjølmiðlarnir fáa burturúr, og hvussu ovurstóra ávirkan Wikileaks hevur. Og rætt hevur hann í, at Wikileaks er eitt fullkomið nýbrot í journalistisku søguni.

Daniel Ellsberg, sum avdúkaði skjølini í Pentagon í 1971, hevur sagt, at hann í fleiri ár hevur bíðað eftir, at internetið fór at verða brúkt til tílíkar avdúkingar, tí møguleikarnir fyri at breiða upplýsingar út um allan heim eru so ovurhonds góðir í dag. Við Wikileaks er hetta so hent. Wikileaks loypur lætt og elegant upp um allar heimsins redaktørar og eisini ofta grundleggjandi journalistiskar meginreglur. Felagsskapurin er nógv djarvari og meira ágangandi, enn flestu fjølmiðlar eru, men hetta kemur so fjølmiðlunum til góðar, sum jú válka sær í upplýsingunum, ið Wikileaks almannakunnger.

Julian Assange livir tó ikki nakað lætt lív. Hann er í Svøríki lagdur undir at hava gjørt seg inn á tvær kvinnur, og helst kemst hetta av, at sterkar kreftir vilja karaktermyrða hann. Skuldsetingarnar høvdu við sær, at hann mátti flýggja úr Svøríki, har Wikileaks annars hevur gjørt sær dælt av frælslyntu ásetingunum um talufrælsi í grundlógini. Assange er nú í London, men í januar gongur hansara uppihaldsloyvi har út, og spurningurin er so, hvagar hann skal fara. Til Íslands? Til Avstralia? Tað heldur hann ikki sjálvur, tí bæði londini eru ov samstarvshugað við USA, hevur hann sagt.

Ið hvussu er má hann krógva seg væl, tí heimsins einasta stórveldi, USA, vil fegið koma á tal við hann og seta hann fastan fyri landsskaðiligt virksemi. Mongu fjepparar hansara fara tó ivaleyst at veita honum skjól so leingi, teir kunnu, tí teir fata hann sum eina hetju, ein journalistiskan James Bond, ið við dirvi og gløggskygni ger eitt alneyðugt arbeiði sannleikanum at frama.